


*- Tað hendi so knappliga, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum gav Athenu og Poseidon loyvi at fiska makrel í føroyskum sjógvi, sigur Jógvan Jespersen, stjóri í Felagnum Nótaskipum*

# Nótaskip ikki viðgjørt Thor-skip

**EINGIN FUNDUR - Vit hava ikki havt fund í felagnum beint nú og hava soleiðis heldur ikki tosað um stóru skipini hjá Thor, sum nú hava fingið loyvi at fiskað makrel í føroyskum sjógvi, sigur stjórin í Felagnum Nótaskipum, Jógvan Jespersen**

Vilmund Jacobsen

Av eini samlaðari føroyskari makrelkvotu upp á tilsamans 85.000 tons í 2010, hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum lutað tilsamans 15.000 tons til aðrar skipabólkar enn skipini, sum Felagið Nótaskip varar av. Burtur av hesum 85.000 tonsunum fara so eisini nøkur túsund tons, sum Føroyar lata av makreli í sínámillum fiskiveiðiavtalum við onnur lond.

Ein felagskvota upp á tilsamans 5.000 tons av makreli er soleiðis latin føroyskum ísfiskatrolarum, partrolarum og lemmatrolarum, at fiska eftir umsókn og játtaðum loyvum.

Tað seinasta nýggja í makrelmálinum er, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, hevur givið stóru skipunum hjá reiðarínum Thor í Hósvík loyvi til at fiska tilsamans 3.250 tons av makreli í føroyskum sjógvi.

**» ... veiðan eftir makreli hevur verið reinari seinastu tíðina, enn roknað hevur verið við...**
JÓGVAN JESPERSEN

### Ikki viðgjørt

Tá tað í høvuðsheitum hava verið skipini, ið Felagið Nótaskip varar av, sum hava átt føroysku makrelkvotuna, hava vit spurt Jógvan Jespersen, stjóra í felagnum, um tey hava viðgjørt avgerðina hjá landsstýrismanninum um at lata Thor í Hósvík hesi 3.250 tonsini av makreli.

- Tað hendi so knappliga, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum gav hesum skipum, Athenu og Poseidon, loyvi at fiska makrel. Vit hava ikki havt fund í felagnum beint nú og hava soleiðis heldur ikki viðgjørt hetta mál.

Tað sigur Jógvan Jespersen, stjóri.

Sum skilst, hevur Felagið Nótaskip ikki vent sær til landsstýrismannin, Jacob Vestergaard, síðan hann tók hesa avgerð í síðstu viku.

### Reinari veiða

Jógvan Jespersen sigur, at skipini, sum eru limir í Felagnum Nótaskipum, nú hava nøkur fá túsund tons eftir at fiska.

- Fiskiskapurin hevur verið skiftandi, og í gjár leitaðu skipini eftir makreli í ein landnyrðing úr Fugloynni.

Spurdur, hvussu hevur verið við íblanding av eitt nú sild, sigur stjórin, Jógvan Jespersen, at veiðan eftir makreli hevur verið reinari seinastu tíðina, enn roknað hevur verið við.

*vilmund@sosialurin.fo*




*Lerkur (mynd) og Phoenix eru millum ísfiskatrolararnar, sum fara at fiska makrel í føroyskum sjógvi*

# Skulu fiska og verða móðurskip

**RISAR Stóru skipini hjá Thor í Hósvík, Athena og Poseidon, hava verið á Fuglafirði og riggað til og eru nú farin á makrelveiði undir Føroyum, samstundis sum tey skulu virka sum móðurskip hjá ísfiskatrolarum**

Vilmund Jacobsen

Athena og Poseidon hava fingið loyvi at fiska 3.250 tons av makreli í føroyskum sjógvi. Samstundis er avtala gjørd millum Thor í Hósvík, sum eigur skipini, og føroysk feløg, sum eiga ísfiskatrolarar, um at skipini skulu virka sum móðurskip, nú ísfiskatrolarar eru farnir á makrelveiði í føroyskum sjógvi.

Sum skilst, fara í fyrsta lagi fýra ísfiskatrolarar at fiska makrel í samstarvi við skipini hjá felagnum í Hósvík. Hesir eru Lerkur og Phoenix og Safir og Smaragd.

Ísfiskatrolarar hava fingið tillutaða eina felagskvotu upp á tilsamans 5.000 tons av makreli og teir, sum fyrstir verða eftir hesum tilfeingi, kunnu fiska upp til hesa kvotuáseting.

Athena og Poseidon hava stóra framleiðsluorku, og hvørt skipið kann virka eini 300 tons av makreli til matna um samdøgnið.

### Eisini onnur

Onnur feløg, sum eiga ísfiskatrolarar, hava eisini havt ætlanir um at fara á makrelveiði í føroyskum sjógvi.

Herfyri hevði Sosialurin samrøðu við Tummas Christophersen í Vestmanna, sum varar av Vestmenningi og Fram.

- Vit hava fingið loyvi at fara á makrelveiði og fara at taka støðu til henda møguleika, tá gulllaksavertíðin er av, segði hann.

Tummas Christophersen segði tað ikki vera óhugsandi, at skipini fara at gera eina roynd, um útlit til veiði og prísir eru áhugaverd, tá tann tíðin kemur.

*vilmund@sosialurin.fo*